tíðindablaðið
sosialurin
Nr. 212 Leygardagur 4. november 1995 69. árgangur Krónur 7,00

# Bonnerup er ein kynikari



Bonnerup arbeiðir út frá køldum handilsprinsippum. Og hann hevur ikki sett seg inn í viðurskiftini í Føroyum



Síða 7

# Bonnerup er ein skilamaður

Bonnerup er sera beinrakin, og hann hevur gott innlit í føroysk viðurskifti, sigur Finnbogi Arge



*Umboð fyri Texaco:*

# Ein vanlukka fáa tit ikki skjótt loyst marknatrætuna

Síða 4 - 5

## »2'arin« í dag:

*Kaj Bang býr nú á Bornholm*

### Húsini eita Nólsoyarstova – báturin Royndin Fríða



Síða 10-11

*Søgan um ferðamannaskipið:*

### Bókavørður savnar tilfar um »Tjaldrið«



Síða 14

*Nýggjar grindakanningar:*

### Vit hava skorið ov frammarlaga



Síða 12-13



*Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini her saman við Bent Baumbach frá Texaco við munnan á kolanáminum í Hvalba. Mynd Jan*

## *Bent Baumbach, geofysikari hjá Texaco:*

# –Vit umhugsa at vera við í Lopra

*-Tað eru fleiri ivamál við eini boring í Lopra, tí tað er ikki vist, at oljufeløgini fara at fáa teir upplýsingar, sum vónað verður. Men verkætlanin er tó so mikið áhugaverd, at vit umhugsa at vera við sigur Bent Baumbach frá Texaco.*

**Møguliga við í Lopra**

Texaco var eitt av feløgunum, sum vitjaði í Havn og í Lopra nú um dagarnar

Bent Baumbach sigur, at teir nú fara at hyggja nærri at tilfarinum og síðani at leggja tá fyri fíggjarligu leiðsluna í fyritøkuni

Hóast hann heldur nýggju boriætlanina í Lopra verða sera áhugaverda, so eru ivamál

Fyri tað fyrsta er tíðarfreistin sera stutt. Teir hava bert ein mánað til at kanna málið og sannføra sínar stjórar um, at hetta er tað rætta at gera

Harnæst er ikki vist, at ein boring fer at geva nakað úrslit. Út frá seismiskum kanningum, sum gjørdar eru í Loprahølinum verður hild-ið, at basaltið møguliga endar 200 metrar longur niðri enn tá borað varð seinast, men eingin veit tað við vissu, tí talan kann eisini vera um annað slag av basalti ella okkurt heilt ann-að. Eingin vissa er tó fyri, at komið verður niður gjøgn-um basaltið, um borað verð-ur 500, 1000 ella fyri tað 1500 metrar longur niður

Bent Baumbach spyr: -hvat nú um borað verður 1500 metrar og vit fram-vegis eru í basalti. Skulu vit tá til at bora eitt sindur longri ella munandi longri, tá verður talan um eitt nógv dýrari projekt!

Tað er so heldur ikki vist, at tekniska uppleggið hjá Dopas er tað besta, eitt nú hvussu sjálv borioperatiónin skal gerast

**Onnur øki møguliga meira áhugaverd**

Bent Baumbach sigur, at møguliga vildi tað verið skilabetri at bora eitt heilt nýtt hol á einum heilt øðrum stað eitt nú offshore t.d. nærhendis markinum

Men av tí at Loprahølið er har, so verður tað nógv bíligari. Tó er tað ikki vist, at tann rætta vitanin fæst burtur úr

Samanumtikið heldur hann tó, at projektið í Lopra er áhugavert og sigur, at góðir møguleikar eru at finna olju og gass við Føroyar. Hann heldur tað tí vera vert at gera íløgur her

-Men tit mugu eisini duga at skilja okkara iva. Tí tað, sum er altavgerandi fyri, um vit seinni vilja vera við í eini útbjóðingarrundu við Føroyar, er spurningurin um tær treytir, sum fara at verða settar okkum. Verða hesar treytir so harðar, at vit velja ikki at vera við, tá eru pengarnir vit nú skulu brúka í Lopra burturspiltir sigur Bent Baumbach

Tað er annars nógv, sum Texaco kundi hugsað sær at vitað um føroysku undirgrundina. Eitt nú vita teir ikki aldurin á grótslagnum og flaúnum undir basaltinum

Hvat viðvíkur Lopra, so bora teir í veruleikanum í "blinde", tí teir vita ikki, hvat er longur niðri. Vanliga vildu tú havt meiri seismiskt tilfar, áðrenn tú gert av, hvar tú skal seta borin í.

Men av tí at hetta er ein tann bíligasta loysnin sýnist at vera áhugi hjá feløgunum. So hóast tað ikki er nummar eitt, so er tað kortini so nógv sum talar fyri eini Lopraboring, at hon helst verður veruleiki heldur hesin útlendski oljuserfrøðingurin.

**Bora nú við markið**

Texaco hevur annars stórar ætlanir á økinum millum Hetland og Føroyar.

Fyritøkan hevur í løtuni ein boripall bert heilt stutt frá føroyska fiskimarkinum. Tað er í blokki 20 nakað sunnan og vestan fyri Foinaven kelduna

Á Texcaco vilja teir einki siga um hesa boring, sum helst er tann boringin, sum hevur verið nærmast føroyskamarkinum nakrantíð. Texaco arbeiðir her saman við oljufelagnum Amerada Hess.

Vit spurdu Bent Baumbach um nakað er í leysatíðindunum um, at teir ætla at skipa ein samtarvsbólk saman við Mærsk Olie og Gas og øðrum feløgum

Hann vil ikki vátta hetta, men sigur, at teir um einar tveir mánaðir fara at almennakunngera, at teir eru farnir í samarbeiði við fleiri onnur oljufeløg um at fara undir størri íløgur millum Føroyar og Hetland

Aðrar fyritøkur, sum Sosíalurin metir kunnu hugsast at samstarva við Texaco er norska Saga Petrolium og amerikanska Arco. Hetta eru tó enn gitingar

Texaco skal innan 1. desember tvs. um triggjar vikur geva Dopas í Keypmannahavn svar, um fyritøkan vil vera við til at fíggja nýggja boring í Lopra

**jan**



*Umboð fyri oljufeløg vitja í Lopra. Mynd Rógvi Johansen*


Nýggjur skógvahandil
í Saltangará
letur upp í dag
leygardagin 4/11 kl. 9.00
við nógvum góðum
upplatingartilboðum
Opið er til kl. 17.00



Vit eru yvir av Statoil-støðini
Fótprýði
600 Saltangará - Tlf. 48150